Løgbiti nr. 2

# Stýrisskipanarlógin § 55 og millumtjóðasáttmálar

LØGMANSSKRIVSTOVAN

**Lógartænastan januar 2019**

# Løgbitar

Ætlanin við løgbitunum er stutt at lýsa nøkur yvirskipað løgfrøðilig ella faklig evni, sum tað er gott at hava sum undirstøði, tá ein lóg ella aðrar rættarreglur skulu gerast.

Løgbitarnir eru eitt leiðbeinandi ískoyti til rundskrivið um lógarsmíð.

Løgbitarnir eru gjørdir í samráð við tey stjórnarráð ella myndugleikar, sum hava serligan kunnleika innan økið, sum løgbitin viðvíkur.

Nella Festirstein
Deildarstjóri á lógartænastuni

**Løgbiti nr. 2**

# Stýrisskipanarlógin § 55 og millumtjóðasáttmálar

Sambært § 55 í stýrisskipanarlógini hevur ein løgtingslóg ikki gildi, um hon gongur ímóti millumtjóðasáttmála, sum heimastýrið hevur gjørt við onnur lond, ella um hon gongur ímóti millumtjóðasáttmála, sum Danmørk hevur gjørt við onnur lond, og sum eisini fevnir um Føroyar.

## 1. Millumtjóðasáttmálar

Millumtjóðasáttmálar eru bindandi fyri statir. Teir eru tí ikki beinleiðis galdandi í landinum, men kunnu vera útfyllandi, har lóggávan er tvískild ella ikki er til. Ein borgari kann ikki styðja sítt rættarkrav einans við at vísa til áseting, sum stendur í millumtjóðasáttmála. Tá ið landið hevur tikið undir við einum millumtjóðasáttmála, hevur landið skyldu til at innrætta tjóðarlóggávuna í samsvari við hann.

## 2. Millumtjóðasáttmálar í Føroyum

Danmark er sáttmálapartur í okkara millumtjóðasáttmálum. Danmark tekur vanliga fyrivarni um, at millumtjóðasáttmálar ikki skulu galda fyri Føroyar og Grønland í fyrstu syftu. Við Løgtingsins samtykki kann sáttmálin víðkast til eisini at fevna um Føroyar. Men tað er Danmark, sum ábyrgdast, um Føroyar ikki halda sáttmálaskyldur.

## 3. Tjóðarlóggáva

Hetta er lóggáva, sum Løgtingið og Fólkatingið hava samtykt, t.e. løgtingslógir og fólkatingslógir. Eisini kunngerðir og donsk bekendtgørelser. Ein borgari kann styðja sítt rættarkrav við at vísa til áseting, sum stendur í tjóðarlóggávu og kann leggja málið fyri dómstólarnar, um fyrisitingin ikki gongur umsókn hansara á møti. Fyrisitingin – stjórnarráð og stovnar – heldur seg bert til løgtingslóggávu og ríkislóggávu og rættarreglur við heimild í teimum í síni fyrisiting.

## 4. Hvat um tjóðarlóggáva ikki samsvarar við millumtjóðasáttmála?

Tað eru ikki stjórnarráðini ella stovnar undir stjórnarráðunum, ið skulu seta til viks eina løgtingslóg, sum er í stríð við millumtjóðasáttmála sambært § 55 í stýrisskipanarlógini. Virðingin fyri eini løgtingslóg má vera stór. Tað eru fólksins umboð, sum hava samtykt hana. Skal rættast í eini lóg, má tað vera Løgtingið sjálvt, sum ger tað. Landsstýrismaðurin hevur heimild at leggja lógaruppskot fyri Løgtingið at broyta lógina, soleiðis at lóggávan fer at samsvara við millumtjóðasáttmálan. Í lógaruppskotinum má vera greitt frá, hví galdandi lóggáva gongur ímóti millumtjóðasáttmálanum. Løgtingið kann so kjakast um málið og siga frá, hvørt tað er samt við landsstýrismanninum um, at lógin gongur ímóti sáttmálanum og so samtykkja at broyta lóggávuna.

## 5. Heimastýrislógin § 5 og Stýrisskipanarlógin § 55

**§ 5.** Føroyska heimaræðið er avmarkað av teimum til eina og hvørja tíð verandi sáttmálaligu og øðrum internationalum rættindum og skyldum (Heimastýrislógin).

**§ 55.** Løgtingslóg, ella partur av løgtingslóg, hevur ikki gildi, um
a) hon gongur ímóti millumtjóðasáttmála, heimastýrið hevur gjørt við onnur lond,
b) hon gongur ímóti millumtjóðasáttmála, Danmørk hevur gjørt við onnur lond, og sum eisini fevnir um Føroyar (Stýrisskipanarlógin).

## 6. Hvør avger, um lóggáva er í stríð við millumtjóðasáttmálar?

Tað eru dómstólarnir, sum endaliga taka støðu til, hvørt løgtingslóg skal setast til viks fyri millumtjóðasáttmála sambært heimastýrislógini § 5, stk. 1 og stýrisskipanarlógini 55, og tá gerst ikki annað hjá fyrisitingini enn at taka slíka niðurstøðu til eftirtektar.